## Brasil uttan Ronaldinho

AC Milan-spælarin, Ronaldinho, sum var við til at vinna HM fyri Brasil í 2002, hevur ikki verið partur av brasilska landsliðshópinum, síðani apríl í 2009. Seinastu tíðina hevur Ronaldinho spælt sera væl fyri AC Milan, og mong hava væntað, at hann fór at verða tikin út til brasilska landsliðshópin aftur. Men tá brasilski landsliðsvenjarin, Dunga kunngjørdi teir 22 spælarnir, sum skulu verða við í hópinum, sum skal møta Írlandi í einum venjingardysti í London 2. mars, var Ronaldinho ikki at finna á listanum Dunga hevur heldur valt Robinho, sum hevur ein leigusáttmála við brasilska liðið, Santos. Dysturin millum Ìrland og Brasil verður á heimavøllinum hjá Arsenal, Emirates Leikvøllinum.



## Brian setir treytir

Danska boksi-bamsan, Brian Nielsen, sum nú tosar um møguleikan at gera come-back í boksiringinum, sigur seg seta eina avgjørda treyt, um ætlanin skal gerast veruleiki. Hann vil nevnliga hava fyrrverandi venjara sín, Poul Duvill við sína lið. – Tey kunnu gloyma allar møguleikar. Poul er tann venjarin, sum kennir meg nógv best, og hann er eisini maður fyri at siga mær, at eg ikki eri til reiðar, um eg ikki eri tað, sigur Brian Nielsen við sporten.dk.

## SÍ-Mjølnir 3-1 (20-25, 25-19, 25-23, 25-16):

# Frálíkur flogbóltur

**Hóast Mjølnir veruliga gjørdi sítt besta og legði bragdliga út í Sørvági í gjárkvøldið, eydnaðist ikki at koppa SÍ, sum nú aftur er langt framman fyri hini kvinnuliðini**




Hilmar Jan Hansen

SÍ, sum bara hevur tapt ein av sínum 15 dystum í vetur, fekk harða mótstøðu í gjárkvøldið, tá Mjølnir var í Sørvági. Ikki minst løgdu kvinnurnar úr Klaksvík øgiliga hart út, og tóku harvið oddaliðið fullkomuliga á bóli í fyrsta setti, tá Mjølnir klárt var betra liðið og eisini vann sannførandi.

Eitt skifti var støðan 14-22, og hóast SÍ ímóti endanum fekk minkað um munin til 18-23, so var mestsum alla tíðina greitt, at Mjølnir átti settið við húð og hár. Álopsspælið hjá gestunum var gott, og Birgit Guttesen, sum áður hevur spælt við SÍ, var ein støðug hóttan, og heimaliðið fekk at kalla slett ikki vart seg.

Dygdin á spælinum var eisini høg í øðrum setti, men nú var dysturin munandi javnari. SÍ byrjaði eitt sindur trilvandi, men fótaði sær so líðandi, og hóast nógvir servufeilir vóru, sóust nú tvey jøvn lið, ið góvu seg fult út. Nógvar duellir vóru at síggja í tætta settinum, ið ikki var avgjørt fyrr enn heilt ímóti endanum, so støðan nú var 1-1.

### SÍ kortini drúgvari

Hóast Mjølnir gjørdi sera góðan figur í Sørvági í gjárkvøldið, so má sjálvandi finnast onkur orsøk – ella fleiri – til ta sannroynd, at SÍ í allan vetur hevur verið so nógv betur enn hini liðini. Í hesum dystinum vóru tað kanska mest taktisku dygdirnar, ið gjørdu munin, tí SÍ megnaði at umstilla seg og yvirtaka, tá mest ráddi um.

Og so vigaði sjálvandi eisini tungt, at royndu spælararnir ikki óttaðust fyri at ganga undan. Í triðja setti fylgdust liðini upp til 9-9, men so fór Annika á Stongum at serva, og í einum koyri servaði hon SÍ framum 15-9. Mjølnir nærkaðist onkra løtuna, men álopsspælið hevði ikki líka fríar teymar sum fyrr í dystinum, og samstundis fekk blokkurin hjá SÍ fatur í nógv fleiri av atsóknunum hjá Mjølnir.

Í fjórða setti gjørdist munurin á liðunum uppaftur størri, og hóast javnt var allarfyrstu bóltarnar, fór SÍ skjótt avstað. Mjølnir kom ongantíð nærri enn trý stig, og onkursvegna tóktist tað, sum luftin var farin úr klaksvíkskvinnunum, ið høvdu givið so nógv tey bæði fyrstu settini, at SÍ neyvan hevur fingið líka harða mótstøðu fyrr í vetur.

Sostatt gjørdist tað enn eina ferð sigur til kvinnurnar í Sørvági, men í einum dysti, har tær hjá Mjølnir høvdu stóra æru av, at hetta gjørdist ein góður dystur við frálíkum flogbóltsspæli. SÍ er nú aftur langt á odda í Eik-liguni hjá kvinnum, samstundis sum tapið var eitt afturstig fyri Mjølnir, ið tó framvegis hongur væl í.



**Mjølnir gav SÍ harða mótstøðu í Sørvági í gjárkvøldið, men kortini rakk tað ikki til sigurs. Hinvegin er SÍ nú aftur nógv fremst hjá kvinnunum**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Dráttur-ÍF 3-0 (25-15, 25-19, 25-16):

# Dráttur liggur framvið

**Við sigrinum á ÍF í gjárkvøldið, samstundis sum Mjølnir tapti fyri SÍ, eru kvinnurnar hjá Drátti aftur væl við í kappingini heilt har frammi**




Hilmar Jan Hansen

Undan dystinum á Giljanesi í gjárkvøldið var Dráttur favorittur, og dysturin endaði eisini við einum greiðum 3-0 sigri, tá ÍF var á vitjan. Hóast spælið ongantíð gjørdist heilt sannførandi, var Dráttur omaná og vann uppiborið.

ÍF kom annars væl frá byrjan beinanvegin og fór framum 1-4, men so fór Maja Popovic at serva, og hon noyddist ikki at gevast, fyrr enn Dráttur var á odda 13-2. Henni á baki hevði Herborg á Mýrini eisini eina røð av góðum servum, og so var botnurin líkasum lagdur undir sigurin.

Hetta við servunum var kanska tað, ið mest sást til, og av tí sama var ikki altíð so nógv spæl. Maja hevði til dømis eisini eina góða servurøð í triðja setti. Samanumtikið vóru nógvir feilir í dystinum, og hóast Dráttur ikki altíð hevði so góðar móttøkur, var álopsspælið nóg gott til, at ÍF ongantíð slapp inn í dystin.

Sigurin merkir, at Dráttur liggur framvið heilt har frammi, og í gjárkvøldið fóru kvinnurnar úr Miðvági og Sandavági á stigatalvuni eitt stig fram um Mjølnir, sum tapti í Sørvági. Dráttur hevur saman stigatal sum TB, ið tó hevur spælt tveir dystir minni, meðan Mjølnir hevur spælt ein dyst minni enn Dráttur.



**Dráttur vann trygt á ÍF og er nú triðfremst í Eik-liguni hjá kvinnum**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Ein dystur útsettur

Upprunaliga skuldi tríggir dystir verið spældir í Eik-liguni hjá kvinnum í gjárkvøldið, men í vikuni boðaði Flogbóltssambandið frá, at dysturin í Trongisvági millum kvinnurnar hjá TB og Fleyr var útsettur. Hann verður í staðin spældur fríggjakvøldið 19. februar klokkan 18.

**hil**